# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tøkk

Eg vil hjartaliga takka tykkum, sum vitjaðu meg á 65 ára degnum og tykkum sum ringdu. Tøkk fyri gávur og takk tit, sum gjørdu mær dagin so hugnaligan. Tøkk til tykkum á Ellisheiminum í Runavík sum vitjaðu meg og Tordur, tøkk fyri vitjanina og fyri gávuna frá tykkum á Ellis- og røktarheiminum í Runavík.
Hjartaliga takk til tykkum sum hjálptu.
Gud veri hjá tykkum øllum.

Takk, Guð, fyri alt sum hendi,
fyri gávur, tú oss ber,
fyri tíð, sum er at enda,
fyri stundina, sum er,
Takk Guð fyri ljósa várið
fyri myrka, kalda heyst,
fyri hvørt hitt gloymda tárið,
fyri hjartafrið og treyst.

Takk, Guð, fyri tað, eg læri,
fyri alt í duldum hekk,
fyri bøn og bønarsvarið,
fyri tað eg ikki fekk!
Takk, Guð, fyri gátur loyndu
fyri hjálp og troystar orð,
fyri náðina fullroyndu,
fyri sælu barnakor.

Takk, Guð fyri gleði tína,
fyri sól og himin blá,
fyri trongd á gøtu míni,
fyri sorg, tú legði á!
Takk, Guð, fyri royndartíðir,
fyri vón, ið trygg oss ger,
fyri ljós, tá náttin líður,
fyri trúgv, ið frelsu ber!

Takk for rósurnar á vegnum,
fyri tornur millum tær,
fyri lív við páskadegnum,
fyri Jesus fótafar!
Takk, Guð, fyri kross og krúnu,
fyri sigursæla stríð.
Fyri pláss við tína trónu,
takk, mín Guð, um alla tíð!

**Heilsan**
**Samulina Jóhannessen**

**80 ára føðingardagur**
Í dag verður Eileen Richmond Hedensted, 80 ár.

**60 ára føðingardagur**
Í dag, 13. okt. fyllir Hildebjartur Antoniussen, 60 ár. Vælkominin á gólvið fríggjakvøldið 14. oktober.

## Dagurin

**13. oktober. Angelus**. Fleiri halgimenni bera hetta navn. Tað er latínskt og merkir eingil, tað er sendiboð.



Tórshavnar alfrøði:

# Niðari partur av Áarvegnum

Myndir av nýggja amtmansgarðinum og niðara parti av Áarvegnum. Arbeiðið við at breiðka niðara partin av Áarvegnum, frá Laðabrekkuni og niðan á Vaglið, og laðan av nýggja amtmansgarðinum byrjaði í 1950 og var liðugt í 1951. Tað var byggimeistarin Vilhelm Tórsheim, sum stóð fyri arbeiðinum, og var samlaði prísurin kr. 160. tús.

Niðara myndin er tikin 1925 - frá Vaglinum og omaneftir. Á myndini sæst hvussu hesin parturin av Áarvegnum sá út, áðrenn lok var lagt á. Ovara myndin, niðan móti Vaglinum, er tikin í 1953, stutt eftir at arbeiðið var liðugt gjørt. Innsetta myndin er av Vilhelm Tórsheim, byggimeistara (1881-1954).

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í samband við hesar myndirnar, eru hon ella hann vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á tel. 214647 ella 314647.

Niðara myndin: Fornminnissavnið